## Robinho rósar enskum áskoðarum

Manchester City-spælarin, Robinho, frøist um áskoðararnar í Onglandi, sum minna hann nógv um áskoðararnar í heimlandinum, Brasil. Sjálvur er hann kendur fyri at duga væl at krússa, skjóta vøkur mál og fremja smálutir, aðrir spælarar ikki duga. Men hóast enska spælið mangan er meira kropsligt, sigur Robinho, at tað passar honum fínt. – Um tú ikki spælir væl ein dag, so fært tú kortini rós og klapp frá áskoðarunum, um tú arbeiðir fyri sakini og taklar ígjøgnum, og tað dámar mær, sigur hann.



## Ove Christensen sekkin í Vejle

Vejle hevur nú tikið avleiðingarnar av einari keðiligari røð av dystum, og hevur sagt venjaran, Ove Christensen, úr starvi. – Eftir 16 dystir uttan sigur, máttu vit finna onkra endurnýgging í dagliga arbeiðinum rundan um liðið og í spælistílinum, grundgevur ítróttarstjórin í Vejle, Hans Lauge, fyri uppsøgnini av venjaranum. Vejle er aftast í SAS-liguni, tvey stig aftan fyri Horsens, sum er beint oman fyri niðurflytingarstrikuna.

# Hoyrdu um Special Olympics

**Eini hálvthundrað fólk møttu á kunnandi fundinum í Miðlahúsinum um vikuskiftið, tá ÍSB og Javni í felag kunnaðu um Special Olympics.**

ÍTRÓTTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Á fundinum, sum var seinnapartin leygardagin, var greitt frá um Special Olympics. Fleiri greiddu frá tí, tey høvdu upp á hjarta, og meðan sjálvur fundurin var, lurtaðu áhoyrararnir eftir tí, sum kom fram. Men aftur við kaffimunninum aftaná gekk prátið lívligt, tí tey vóru mong, ið fegin vildu vita meira.

– Eg haldi, at fólk heldur vildu lurta og fáa so nógv við sum gjørligt, enn at seta spurningar, tí her var ikki beinleiðis lagt upp til orðaskifti. Kanska vit skuldu farið víðari kring landið upp á henda mátan at greitt nærri frá um Special Olympics, sigur ein av stigtakarunum til fundin, Tóra Øre Hansen, sum er venjari hjá menningartarnaðum í svimjing.

– Vit hava eisini bara fingið góðar afturmeldingar eftir fundin, og tær eru bæði komnar frá teimum, sum vistu eitt sindur um Special Olympics frammanundan, og frá teimum, ið kanska ikki vistu so nógv, áðrenn tey komu á fundin.

Sum sagt, so var hetta fyrst og fremst ein kunnandi fundur. Elna Skylv legði fyri við at greiða frá um Special Olympics, og síðani var vístur ein stuttur filmur um Special Olympics World Summer Games í Shanghai í 2007. Har var táverandi mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, til staðar, og hann greiddi frá, hvussu hann upplivdi ferðina og leikirnar.

Síðani tosaði Anette Olsen eitt sindur um, hvørjar upplivingar, hon hevur havt sum foreldur at íðkandi, og Unn Mortensen greiddi so frá, hvussu tað er at vera íðkandi. At enda tók Sonni Djurhuus samanum, áðrenn farið var til ein drekkamunn, samstundis sum ein myndasýning var.

– Special Olympics fevnir um breiddina og leggur dent á, at øll kunnu vera við. Tey, sum eru elitan, eru so í øðrum felag, sum í okkara føri er ÍSB. Hinvegin hava vit ofta sæð, at burtur úr breiddini er komin ein elita, sigur Tóra Øre Hansen.

– Endamálið er, at tað skal vera ein náttúrligur partur av ítrótti, at eisini fólk við breki kunnu vera við. Tí fegnast vit um, at hurðar støðugt lata seg upp, sum vit eitt nú hava sæð tað, nú Fótbóltssambandið eisini fer at skipa fyri fótbóltskappingum fyri fólk við breki. Hetta er bara eitt stig av mongum á leiðini.



*Eini hálvthundrað fólk vóru seinnapartin leygardagin møtt í Miðlahúsinum at hoyra um Special Olympics*
*Mynd: Elna Skylv*



*Helma Maria Tróndheim og Alex Joensen, bæði úr Sunda Judofelag, takast í einum av dystunum leygardagin*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

## Ungir judomeistarar

**Hetta er tíðin, tá FM-kappingarnar í judo eru, og leygardagin 11. apríl verða FM-kappingarnar hjá unglingum og vaksnum, og samstundis verður kappingin hjá børnum í opnum vektflokki. Men longu um vikuskiftið kappaðust børn í FM-kappingini fyri einstaklingar. Henda kapping var á Oyrarbakka, og úrslitini síggjast niðanfyri.**

**Nýbyrjað -23 kg**
1. Robert Samuelsen, Sunda Judofelag
2. Malaki V. Niclasen, Havnar Judofelag

**Nýbyrjað -28 kg**
1. Harald Joensen, Sunda Judofelag
2. Niklas Ejdesgaard, Sunda Judofelag
3. Pætur F. Joensen, Havnar Judofelag

**Nýbyrjað -38 kg**
1. Regin á Rógvu Joensen, Sunda Judofelag
2. Markus Hansen, Sunda Judofelag
3. Dávid Dam, Havnar Judofelag

**Nýbyrjað -48 kg**
1. Elisabeth Nygaard, Havnar Judofelag
2. Ragnar Krusen, Havnar Judofelag
3. Flóvin í Kollsbyrgi, Sunda Judofelag

**Nýbyrjað +48 kg**
1. Jónas Højgaard, Havnar Judofelag
2. Egi Djurhuus, Havnar Judofelag
3. Trúgvi Gaard, Havnar Judofelag

**Roynd -42 kg**
1. Aksel D. Remmel, Havnar Judofelag
2. Carsten Joensen, Sunda Judofelag
3. Óli Køtlum, Havnar Judofelag

**Roynd -48 kg**
1. Jónas Johannesen, Sunda Judofelag
2. Ernst D. Remmel, Havnar Judofelag
3. Hálvdan Reginsson, Sunda Judofelag

**Roynd +48 kg**
1. Fríði Dam, Sunda Judofelag
2. Tróndur Petersen, Havnar Judofelag
3. Pætur Jákupsson, Havnar Judofelag

# Gunnar góður fjallmaður

**Í kappingini í fjallasúkkling leygardagin gjørdist tað enn eina ferð Gunnar Dahl-Olsen, ið vann. Mest merkisverda úrslitið átti Kjartan Egholm, ið megnaði at seta bæði Sverra Mohr Edvinsson og Høgna R. Øster av og fáa annað plássið.**

FJALLASÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast vit best kenna Gunnar Dahl-Olsen frá teimum meira vanligu súkklukappingunum, hevur hann víst seg at vera sera drúgvur í fjallasúkkling eisini. Sjálvt um vanlig kappsúkkling meira er hansara grein, endar hann sum oftast við eisini at vinna kappingarnar í fjallasúkkling.

So var eisini leygardagin, tá Tórshavnar Súkklufelag og Føroya Triathlon Felag í felag skipaðu fyri fjallasúkklukapping á gøtunum millum Hotel Føroyar og fjósini í Havnardali.

– Eg haldi, at vanliga súkklingin kemur mær til góðar, tí eisini her snýr tað seg snøgt sagt um at traðka í pedalirnar. Men eg trívist væl á hesum smølu gøtunum við grovum gróti og tori rímiliga væl eisini, tá undirlagið kanska ikki er tað besta og tað eisini er bratt, sigur Gunnar, sum rættiliga tíðliga megnaði at sleppa leysur av hinum og síðani helt seg eitt fitt petti frammanfyri allan vegin.

– Fyrsti tríggjar kilometrarnar koyrdu vit varliga og lúrdu eitt sindur eftir hvørjumøðrum, men so kom ein góð undanbrekka, har væl lá fyri at fáa ferð á, og tá fekk eg eitt vunnið mær eitt glopp niður til hinar. Kanska tordi eg betur at seta ferðina upp í undanbrekkuni, og tá eg var blivin leysur av hinum, ráddi bara um at halda munin.

Gunnar Dahl-Olsen sigur, at av tí at talan var um ein átta kilometra langan tein, sum skuldi koyrast tríggjar ferðir runt, bar til at síggja, hvar hinir vóru staddir, og sostatt var rímiliga lætt at hava tamarhald á støðuni har frammi.

### Kapping aftanfyri

Tá tað rættiliga skjótt gjørdist greitt, at Gunnar mestsum ikki kundi takast aftur – og eisini vann við tíðini ein tími, tveir minuttir og fýra sekund – gjørdist størri spenningur um tað, sum hendi millum hinar súkklararnar, sum fylgdust tað mesta av tíðini. Men tað mesta av tíðini var Kjartan Egholm fremstur av teimum næstubestu, og so skiftust Høgni R. Øster og Sverri Mohr Edvinsson um at halda tørn aftan fyri hann.

Ímóti endanum setti Kjartan ein spurt inn, sum tryggjaði honum annaðplássið, fimm minuttir aftan fyri Gunnar og tríggjar minuttir framman fyri Sverra, sum í kappingini millum hinar báðar gjørdist Sverri drúgvari og fekk triðjaplássið, ein minutt framman fyri Høgna, sum mátti taka til takkar við fjórðaplássinum.

»The Grand Old Man« í føroyskari súkkling, Evald Rasmussen, var so tann fimti á mál, hálvantriðja minutt aftan fyri Høgna, og hóast hann er væl eldri enn hinir í feltinum, fekk hann eina fína tíð leygardagin. Hann var einsamallur í bólkinum fyri teir, ið eru eldri enn 45 ár, so hann vann sjálvandi eisini tann bólkin.



*Sverri Mohr Edvinsson kappaðist við Høgna R. Øster um at taka dystin upp við Kjartan Egholm, sum var tann næstfremsti – aftan fyri suverena vinnaran, Gunnar Dahl-Olsen*